# DÁTUVERNDARKUNNING

Henda dátuverndarkunning greinar, hvørjar persónligar dátur Skansi Offshore savnar um teg, hvussu vit nýta hesar dátur, og hvussu tú kanst gera brúk av tínum rættindum.

Skansi Offshore viðger persónligar dátur frá uttanhýsis einstaklingum, so sum umboðum fyri okkara kundum, veitarum og vinnuligum samstarvspørtum, umframt øðrum, sum seta seg í samband við okkum, eitt nú verandi og/ella møgulig starvsfólk.

Persónligar dátur merkir allar upplýsingar, sum kunnu knýtast at einum navngivnum ella eyðmerktum natúrligum persóni.

Henda dátuverndarkunning greinar, hvørjar persónligar dátur Skansi Offshore savnar um teg, hvussu vit nýta hesar dátur og hvussu tú kanst gera brúk av tínum rættindum samsvarandi galdandi persónsverndarlóggávu.

## Set teg í samband við okkum

Um tú hevur spurningar ella ivast í, hvussu vit savna og viðgera tína persónliga data, so ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkara Dátuverndarfólk hjá Skansi Offshore, Skansavegur 7, FO-100 Tórshavn, teldupostur: privacy@skansi.fo.

Skansi Offshore er at meta sum dátuverji fyri tær dátur, ið er nevndar í hesi dátuverndarkunning.

## Endamál og lógarheimild

Skansi Offshore savnar dátur fyri at kunna reka okkara virksemi skynsamt, liva upp til lógir og reglur, betra um okkara tænastu til okkara kundar, fáa tænastur frá okkara veitarum og samstarva við okkara vinnuligu samstarvspartar.

Persónligar dátur, ið vit savna, kunnu verða samanbornar við dátur fingnar frá øðrum feløgum. Sambært niðanfyri nevnda broti um 'Orsøkir til at vit deila persónligar dátur', so er atgongd til tínar persónligu dátur strangt avmarkað til starvsfólk hjá Skansi Offshore, ið hava neyðugt loyvi og ein kláran vinnuligan tørv á hesum dátum.

Lógarheimildin fyri innsavnan og viðgerð av persónligum data er ES-fyriskipan 2016/679 ("GDPR"). Serliga byggja vit okkara viðgerð á grein 6.1:

1. samtykki
2. neyðugt fyri at fremja ein sáttmála
3. neyðugt fyri at fremja okkara lógligu áhugamál, sum ikki verða tilsíðis sett av áhugamáli hjá tær sum persóni.

Haraftrat er okkara persónsdátupolitikkur í samsvar við "Dátuverndarlógina".

## Hvussu vit nýta persónligar dátur

Henda dátuverndarkunning greiðir frá, hvat tú kanst vænta tær, tá Skansi Offshore savnar persónligar dátur um teg.

### 1. Vitjandi á heimasíðuni

Vit nýta ikki kennifílur (cookies).

Vitjandi á www.skansi.fo, sum fylla út starvsumsókn, verða biðin um at veita persónligar dátur, herímillum navn, føðingardag, bústað, starvsheiti, hjúnafelagsstøðu, telefon nummar, teldupost, tjóðskap og eins og upplýsingar og skjøl viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum og prógvum, sum innihalda enn meira persónligar dátur.

- Starvsumsøkjarar samtykkja, at teirra persónligu dátur verður goymdar í mesta lagi 12 mánaðir. Hetta samtykki kann takast aftur við at venda sær til Dátuverndarfólk hjá Skansi Offshore, teldupostur: privacy@skansi.fo.

Vitjandi á www.skansi.fo, sum søkja um stuðul frá Skansi Offshore verða biðin um at veita persónligar upplýsingar, herímillum navn, bústað, telefonnummar, teldupost og møguliga felagsnavn og starvsheiti.

- Persónligar upplýsingar frá umsøkjarum, sum søkja stuðul frá Skansi Offshore verða goymdar í mesta lagi 3 mánaðir.

### 2. Kundar

Fyri at kunna veita okkara kundum tær tænastur, ið teir krevja frá okkum, savnar og goymir Skansi Offshore vinnuligar kontaktupplýsingar, so sum navn, navn á felagi , telefonnummar, faxnummar, starvsheiti og deildarnavn. Vit goyma eisini samskifti, ynski ella aftursvar, sum eru týdningarmikil fyri tænastuveitingina.

### 3. Veitarar og samstarvspartar

Skansi Offshore goymir vinnuligar kontaktupplýsingar, so sum navn, bústað, telefon og teldupost, umframt aðrar dátur, ið eru neyðugar fyri at viðgera fakturar, gjøld ella aðrar skyldur vit hava yvirfyri veitarum, umboðum ella øðrum vinnuligum samstarvspørtum.

### 4. Umsøkjarar um stuðul

Tá einstaklingar søkja um stuðul, lata teir upplýsingar í umsóknarblaði, har teir greiða frá sínum ætlanum og einari kostnaðarmeting. Tey, ið fáa játtaðan stuðul, verða biðin um at veita frágreiðingar um framgongd og útreiðslur. Persónligar dátur, ið verða latnar í umsókn og í sambandi við stuðulin, verða bert nýttar til at viðgera umsóknina og umsita stuðulin.

- Persónligar dátur hjá umsøkjarum, sum fáa játtað stuðul, verða goymdar í mesta lagi 5 ár.
- Persónligar dátur hjá umsøkjarum, sum ikki fáa játtað stuðul, verða strikaðar, tá ið umsóknin er avgreidd.

### 5. Fólk, ið senda okkum teldupost

Vit nýta Transport Layer Security (TLS) fyri at kryptera og verja teldueposttrafikkin á skrivstovuni. Um tín telduposttænasta ikki stuðlar TLS, skalt tú vera varug(ur) við, at teldupostar, vit senda ella móttaka, kunnu vera óvardir undir flutningi.

Vit kanna eisini allar teldupostar, sum verða sendir til okkara, umframt viðheft skjøl, fyri virus ella skaðiliga forrit. Vinarliga minst til, at tú hevur ábyrgd av at tryggja, at allir teldupostar, tú sendir, eru í samsvari við lóggávuna.

**6. Vitjandi á skrivstovuni**

Vitjandi hjá Skansi Offshore skulu skráseta seg av trygdar- og umsitingarávum. Vit innsavna navn og felagsnavn.

**7. Vitjandi umborð á okkara skipum**

Vitjandi umborð á skipunum hjá Skansi Offshore skulu skráseta seg av trygdar- og umsitingarávum. Vit skráseta navn og navn á felagi.

**8. Starvsfólk**

Skansi Offshore savnar dátur, ið eru neyðugar fyri at meta um førleikar hjá umsøkjarum, so sum persónligar kontaktupplýsingar, starvsroyndir, útbúgving, viðmæli og prógv. Um tú verður útvald/ur, kunnu vit harumframt savna samrøður, royndir og úrslit av bakgrundskanningum. Um Skansi Offshore gevur eitt endaligt tilboð um starv, fara vit eisini at biðja um aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at umsita títt starv hjá okkum, so sum bankaupplýsingar og upplýsingar um avvarðandi.

- Persónligar dátur hjá starvsfólki verða goymdar í 5 ár eftir, at starvsfólkið er givið í fyritøkuni.

## Orsøkir til at vit deila persónligar upplýsingar

Av og á ger Skansi Offshore sáttmálar við aðrar fyritøkur fyri at útinna tænastur fyri okkum. Í hesum førum meta vit tað neyðugt at deila upplýsingar. Um persónligar upplýsingar verða fluttar til slíkar uttanhýsis fyritøkur (sum dátuviðgerar), fara vit at seta í verk neyðug trygdartiltøk í samsvari við galdandi dátuverndarlóggávu, t.d. við at gera dátuviðgerðaravtalur.

Slíkir veitara sleppa bert at móttaka persónligar upplýsingar í tann mun, tað er neyðugt fyri at veita teirra tænastur til Skansi Offshore. Vit fara ikki at almannakunngera tínar persónligu upplýsingar, til triðjapart, við tí endamáli at marknaðarføra teirra vørur ella tænastur til tín, og hvørki vit ella tey, fara at selja ella lata tínar persónligu upplýsingar víðari, uttan títt skrivliga samtykki.

## Trygd í viðgerðini av persónligum dátum

Vit viðgera tínar persónligu dátur í samsvari við galdandi persónsverndarlógir, herímillum GDPR. Viðgerðin verður framd trygt, og vit seta í verk hóskandi teknisk og skipanarlig tiltøk fyri at verja tínar persónligu dátur móti tilvildarligari ella ólógligari oyðing, tapi, broyting, óheimilaðari avdúking ella atgongd, serliga tá ið viðgerðin fevnir um flutning av dátum um eitt netverk, og móti øllum øðrum ólógligum háttum at viðgera dátur.

## Varðveitslutíð

Vit goyma ikki tínar persónligu dátur longur enn neyðugt fyri endamálið, sum tær vórðu savnaðar til. Tá vit ikki longur hava brúk fyri teimum, verða dáturnar antin strikaðar ella anonymiseraðar á ein tryggan hátt.

## Tíni rættindi

Rættindi hjá tí skrásetta:

**Innlit:**
Tú hevur rætt til at biðja um innlit í tínar persónligu dátur, sum Skansi Offshore viðger. Hetta merkir, at tú kanst spyrja okkum, hvørjar dátur vit hava um teg, og hvat vit nýta tær til.

**Mótmæli:**
Tú hevur rætt til at mótmæla nýtsluni av tínum persónligu dátum í ávísari viðgerð. Tó kunnu tínar dátur framvegis verða nýttar í øðrum viðgerðum, altíð innanfyri lógarinnar karmar.

**Rætta:**
Tú hevur rætt til at biðja um at persónligar dátur, sum tú metir at vera skeivar, verða rættaðar.

**Strika:**
Tú hevur rætt til at biðja um, at vit strika persónligar dátur, sum tú heldur, at vit ikki áttu at goymt. Tó er hesin rættur ikki endaligur. Vit eru sambært lóg ella avtalum forðað í at strika ávísar persónligar dátur.

**Avmarka:**
Tú hevur rætt til at avmarka nýtsluna av tínum persónligu dátum. Hetta merkir, at dátur ikki verða strikaðar, men at endamálið við goymsluni verður ásett, og at atgongdin til dáturnar verður avmarkað til ávísar persónar hjá Skansi Offshore.

**Dátuflutningur:**
Tú hevur rætt til at móttaka tínar persónligu dátur í einum skipaðum og teldutøkum formati. Hetta er tó bert galdandi fyri dátur, ið tú sjálvur hevur latið okkum.

**Eingin lýsing:**
Tú hevur rætt til at nokta, at Skansi Offshore nýtir tínar persónligu dátur til lýsingar.

**Afturtøka av samtykki:**
Um lógargrundarlagið fyri okkara goymslu av tínum dátum er samtykki, hevur tú rætt til at taka aftur títt samtykki, tá ið tú ynskir.

## Klagur

Um tú hevur spurningar viðvíkjandi goymslu og/ella viðgerð av tínum persónligu dátum hjá Skansi Offshore, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkara Dátuverndarfólk á telduposti: privacy@skansi.fo.

Um tú ert ónøgdur við goymsluna og/ella viðgerðina av tínum persónligu dátum hjá Skansi Offshore, kanst tú klaga við at seta teg í samband við Dátueftirlitið (www.dat.fo).

## Val av lóg og rættarstað

Øll ósemja, sum stendst av tínari nýtslu av hesi heimasíðu og/ella okkara viðgerð av tínum persónligu dátum, verður regulerað av og tulkað samsvarandi við lóggávuna í Føroyum.

## Broyting av dátuverndarkunningini

Henda dátuverndarkunning varð seinast dagførd tann 05.03.2025. Vit hava rætt til at broyta dátuverndarkunningina av og á, og mæla tær til javnan at kunna teg um innihaldið í fráboðanini.